# Klaksvíkingar hava keypt handilsimperiið hjá Ossa




*Bygningurin hjá Gunnleivi við Hoyvíksvegin kann um fá ár gerast partur av Miðlon*

**Norðoyar Sparikassi hevur keypt virksemið hjá P/F Vørður frá Justinussen monnunum, og klaksvíkingar eiga nú størsta bakarí í landinum, umframt stóran part av matvøruhandlunum í Havn. Felagið verður nú brotið sundur og selt, sigur Eyðfinn Reyðberg stjóri í Norðoyar Sparikassa.**

HANDILSVINNA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eitt felag hjá Norðoyar Sparikassa hevur keypt P/F Vørður, ið eigur Bakaríið hjá Gunnleivi umframt handilin hjá Gunnleivi við Hoyvíksvegin, Handilin hjá Eli við Landavegin, Statoilstøðina á Argjum, Frants Restorff í Tórsgøtu og Hjá Pidda á Toftum. Keypið er fyrst og fremst fyri at fáa hendur á teimum bygninginum, ið bakaríið og handilin hjá Gunnleivi halda til í, sigur Eyðfinn Reyðberg stjóri í Norðoyar Sparikassa við Sosialin.

– Vit skulu ikki dríva vinnulív, tað hava vit ikki loyvi til, sigur hann

Handilin gekk sera skjótt, og kom uppá pláss bein fyri ólavsøku. Felagið hjá Norðoyar Sparikassa yvirtekur virksemið longu ímorgin týsdagin 1. august.

Gunnar Justinussen váttar, at teir hava selt alt handilsvirksemið, ið teir seinastu tíðina hava savnað í felagnum P/F Vørður, og sigur at við hesum takka teir fyri seg í hesi bransjuni.

– Hetta var stuttligt, hóast tíðarskeiðið ikki var stórt meira enn eitt hálvt ár, sigur Gunnar Justinussen. Hann sigur orsøkina til søluna vera sera einfalda, teir fingu eitt gott tilboð, og valdu at taka av.

– Hetta er ikki nøkur panikkloysn!, leggur hann dent á.

Hann vil ikki avdúka, hvussu nógv felagið er selt fyri. Men sigur, at talan ikki hevði verið um eitt gott tilboð, um teir seldu virksemið við halli.

Tá Justinussen menninir fóru undir at keypa upp handlar og bakarí, var hetta ikki beinleiðis við eini skjótari sølu fyri eyga. Men



*Felagið verður nú brotið sundur og selt, sigur Eyðfinn Reyðberg stjóri í Norðoyar Sparikassa.*

Gunnar Justinussen sigur, at teir arbeiða undir teimum fyritreytum, at alt er umsetiligt, men, at ætlanin ongantíð hevur verið, at selt hetta víðari so skjótt.

Enn eru ongar ætlanir um at seta peningin, ið teir hava fingið fyri søluna í annað virksemi, sigur Gunnar Justinussen.

– Í staðin fara vit at nýta høvið til at hava frí 2-3 tímar longri um dagin, sigur hann.

Eyðfinn Reyðberg stjóri í Norðoyar Sparikassa vísir á, at Norðoyar Sparikassi flytur inn í grannabygningin hjá Gunnleivi, Miðlon í heyst. Tað er í hesum sambandi, at hesin bygningur er vorðin áhugaverdur.

- Eitt bakarí kann í prinsippinum liggja alla staðni, og vit meta at møguleikar eru fyri at útnytta bygningin hjá Gunnleivi og Miðlon betur saman, um virksemið skal víðkast um nøkur ár, sigur Eyðfinn Reyðberg við Sosialin.

Nú verður fari undir at býta virksemið hjá P/F Vørður sundur, fleiri áhugaðir partar eru í at keypa handils og baksturvirksemið, og hetta verður selt skjótast til ber. Enn er tó ikki greitt, um handlar og baksturvirksemið verða seld saman ella hvør sær. Í sambandi við baksturvirksemið verður talan um sølu av virkseminum, við møguleika fyri tíðaravmarkaðari leigu. Eyðfinn Reyðberg væntar, at perspektivini eru 5-7 ár, áðrenn tað verður áhugavert at brúka bakarí bygningin í sambandi við Miðlon.



# Samrøða við David Phelps í Lindini

Tað hevur eydnast Lindini at fáa ein samrøða við David Phelps, ið komandi vikuskifti kemur til Klaksvíkar at spæla á Summar Festivalinum.

David Phelps er í hesum døgum á umfatandi konsertferð í USA. Har hansara triðja útgáva sum einstaklingur, Life Is a Church, er sera vælumtókt. Tað er Tór Arni Samuelsen, sum er vertur og prátar við hesa heimsstjørnu.

Sendingin verður send í Lindini hesar tíðir: Mánadagin 31. juli kl. 15.00, týskvøldi 1. aug. kl. 21.00, mikudagin 2. aug. kl. 13.30.

**nud**




# Eingin toleransa í dálkingarmálum í Havn

Heðin Mortensen borgarstjóri í Havn sigur, at Tórshavnar kommuna æltar at fara líka harðliga til verka móti teimum, ið hava ábyrgd av dálkingini av Havnarvág fríggjadagin, sum kommunan fór fram ímóti Tórshavnar Skipasmiðju og Føroya Fiskavirking, ið hon meldaði til løgregluna í síðstu viku. Dálkingin hendi tá tá grønlendski trolarin Mikol L úr Maniitsoq, bunkraði yvir og útvið 100 litrar av dieselolju fóru á sjógv.

Heðin Mortensen segði við Sosialin: "Sovorðið má ikki finna stað! Her verður eingin slingur í valsinum framyvir. Vit brúka millionir til at reinsa vágna. Man helt jú, at dálkingin kom úr býnum, og so kemur hon nú av sjálvari vágni". Ein sera ónøgdur Heðin Mortesen og helt fram: "Hvussu skulu vit fáa vágna reina til ólavsøkuna?"

Heðin vísti á, at kommunan hevði úr at gera við at gera klárt til ólavsøkuna, og hevði als ikki tíð til tílíktar mannaskaptar trupulleikar. "Tey, ið skapa hesar trupulleikar læra bert upp á ein máta, so framyvir verður eingin toleransa, øll tílík dálking í Havn verður politimál!"

**nud**